Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)
(Striking av áseting um lægri veiðigjald, tá ið tøka kvotan minkar serliga nógv)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023 og løgtingslóg nr. 41 frá 25 mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 5 stk. 3 og § 6, stk. 2 verður ", samanber tó § 7, stk. 2" strikað.

2. § 7 verður strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Samtykt á Løgtingi hin 17. desember 2025 við 17-0-14 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 17. desember 2025

stjóri

LM-056/2025